# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Andlát og jarðarferðir

**Frida Jacobsen, Leirvík**, andaðist á Røktar- og Ellisheiminum í Runavík, 100 ára gomul.

Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík hósdagin klokkan 18.

Jarðarferðin verður úr Leirvíkar kirkju fríggjadagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Fridu, kunnu lata Leirvíkar kirkju eina pengingagávu, konto í Pengastovnunum.

**Ragnhild Poulsen, ættað av Eiði**, andaðist 4. oktober í Næstved, 64 ára gomul.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæra kona, mamma, omma, langomma og vermamma

**Jóna Eivilda Andreasen**

doyði og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til sambýlið.

*Familjunnar vegna*

**Hans Jacob og børnini**

## Dagurin

**6. oktober. Broderus**. Ókent halgimenni.




## Kári Árting í býráðið



Jógvan Arge, býráðslimur í Havn, hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðsliur í meira enn samfullar 14 dagar.

Næstur á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum í Tórshavnar Býráð er Kári Árting, og tekur hann tí sæti í býráðnum í Havn næstu tvær vikurnar.

Býráðsfundur var hóskvøldið 6. oktober kl 18.

FM í Settlers:

# Súsanna og Reimund til heimsmeistaraskapin í Essen

**Leygardagin 24. september 2005 varð FM í Settlers í Bridgehúsinum í Havn. 21 luttakarar vóru til kappingina, og tvey komu víðari til heimsmeistaraskapinum í Settlers, sum verður í Essen í Týsklandi 14.-16. oktober**

SPÆL



*Finalistarnir f.v.: Reimund Langgaard, sum bleiv nr. 1, Hildigerð Højgaard, Janus Kannuberg og Súsanna Joensen, sum bleiv nr. 2*

Settlers er eitt spæl, ið nógv hava tikið til sín her í Føroyum - bæði ung og gomul. So nógv at leygardagin 24. september 2005 varð tikið stig til eitt føroyameistaraskap í Settlers.

Nummar 1 og 2 í kappingini vinnu luttøku í heimsmeistaraskapinum í Settlers, sum verður í Essen í Týsklandi 14.-16. oktober 2005.

Vinnari varð Reimund Langgaard í Leirvík, og nr. 2 varð Súsanna Joensen í Havn. Tey komu víðari til heimsmeistaraskapin í Essen.

Spælt varð við altjóða reglum, og vórðu tær víðkaðu útgávurnar av Settlers ikki nýttar. 21 luttakarar í aldrinum 18-35 ár vóru til kappingina. Atlantic Airways og Thomas Dam á Hálsi vóru høvuðsstuðlar av tiltakinum.

Ikki færri enn 31 lond luttaka til hetta HM, eitt nú Japan, Taiwan, USA og Ísland.

# 13 ár síðani 6. oktober

Tað kom sum ein skelkur gjøgnum føroyska samfelagið, tá tíðindini bórust tann 6. oktober í 1992, at Sjóvinnubankin var farin av knóranum - og kortini varð bjargaður.

Júst hesin dagurin, 6. oktober, var ímyndin av kreppuni, sum síðani rættuliga fekk hvørkratak um føroyska samfelagið.

Longu aftur í januar í 1993 var aftur galið _ og tá við báðum bankunum, Sjóvinnubankanum og Føroya Banka, sum seinni hetta várið vórðu lagdir saman í ein banka, har Fíggingargrunnurin av 1992 átti allan partapeningin.

Sosialurin hevði sum vera man hesi tíðindi sum høvuðssøgu og einastu søgu á forsíðuni hendan dagin.

Blaðið skrivaði: »Fólk fingu rættiligan skelk, tá tað ígjár frættist, at kreppuloysn mátti til fyri at bjarga Sjóvinnubankanum og Føroya Banka«

Helgi Fossádal, sum var stóri í Fossbankanum segði við blaðið, at hann harmaðist tað, sum hent var, men at hann bert kundi vóna, at fólk nú aftur fingu álit á føroyska peningamarknaðinum, sum hann helt vera rættiliga tiltrongt.




*Forsíðan á Sosialinum 7. oktober 1992*

Atli Dam, løgmaður, segði við Sosialin, at talan var um eitt val millum pest og kolera. Løgmaður og Jógvan Sundstein, vóru nærmast á nátt róptir til Danmarkar at viðgera støðuna, sum bankarnir vóru komnir í.

– Einhvør kann ímynda sær, hvørja avleiðingar tað hevði fingið fyri føroyska samfelagið, um annar av bankunum stongdi, segði Atli Dam í samband við ta avtalu, sum gjørd var millum danskar myndugleikar og landsstýri um at forða fyri, at Sjóvinnubankin stongdi.